# Frá Havleiki til dansinátt í Norðurlandahúsinum

**Í kjalarvørrinum av Havleiki verður árliga dansináttin, sum Sláið Ring og Norðurlandahúsið skipa fyri, hildin leygarkvøldið. Klaksvíkar Dansifelag er vertur**

DANSINÁTT
*Edvard Joensen*



*Dansurin gongur vanliga lystiliga frá tí, latið verður upp, til givist verður einaferð út á náttina*

Komandi leygarkvøld klokkan 22.00 lata dyrnar í Norðurlandahúsinum upp fyri árligu dansináttini, sum Norðurlandahúsið og Sláið Ring, ið er landsfelagið hjá føroysku dansifeløgunum, í felag skipa fyri.

Árliga dansináttin í Norðurlandahúsinum er afturvendandi tiltak, sum hildið verður nakað undan ólavsøku. Vanligt er, at eitt dansifelag stendur sum vertur fyri tiltakinum. Tað vil siga, at tey hava ábyrgdina av at skipa tær fyrstu tvær-tríggjar vísurnar. Síðan er sum vanligt opið fyri hvønn, sum heldur seg til at byrja.

Í tíðindaskrivi, sum Sláið Ring hevur sent út, verður líkasum lagt upp til, at evni á dansináttini skal takast úr føroyskum kvæðaheimi. Nærri ásett úr Kópakvæðinum.

Tikið verður í, at nú Havleikur júst er liðugur, er nærliggjandi at hugsa, at hetta vóru kóparnir, sum komu uttan av havi upp á helluna at dansa.

Soleiðis verður hesin dansur førdur víðari yvir á dansináttina í Norðurlandahúsinum, har kópar úr ymsum ættum hittast til leik og spæl - um ikki um gomlu jól sum í Mikladali - so í hulduheygnum í Sortudíki, nú tað fer at dimma aftur undan ólavsøku.

Dansináttin í Norðurlandahúsinum hevur nú nøkur á á baki, og verður hon væl vitjað á hvørjum ári.

Ikki eru tað bara tey, sum hoyra dansifeløgunum til, sum koma í dans eina sovorðna nátt, uttan eisini hvør tann, sum áhuga hevur í bæði at síggja og hoyra dansin, eins og at luttaka sjálvur. Tað kunnu vera føroyingar búsitandi uttanlands, sum leitað hava sær heim í summarfrí, eins væl tey, sum búgva her á landi.

Eisini er vanligt, at nógv fremmand ferðafólk, sum stødd eru í Føroyum, koma í Norðurlandahúsið til júst hetta tiltakið.

Her er møguleiki hjá teimum at síggja føroyskan dans »live«, um vit so kunnu siga. Uttan uppsetingar við skyggjandi silvuri og vandum vísum og dansispølum, sum annars er vanligt at vísa ferðafólki.

Hetta er tann føroyska operan, tá hon er best, har øll, bæði leikarar og áskoðarar, luttaka.

Byrjað verður leygarkvøldið klokkan 22.00 og hildið á til klokkan 03.00. Kostnaðurin er kr. 60,-.

# Ferðandi sandur

**Sandurin í Miðvági ferðast dúgliga eftir botni, og hevur lagt eina grynnu beint innanvert flakavirkið**

HAVNAVIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*



*Vesturbúgvin stóð á sandgrynnuni í Miðvági hendan dagin. Grynnan verður grabbað upp, og so er reint aftur*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Sandur plagar at ferðast eftir botni, og tað ger tann í Miðvági eisini. Miðvingar halda, at síðan verjugarðarnir komu, er ferðamynstrið broytt eitt sindur.

Tað er soleiðis, at í Miðvági kemur sandurin inn við Prestlandinum og ferðast so fram við vágsbotninum yvir móti ósanum og so út aftur við Húsalandinum.

Fyrr var ósin meira mitt fyri sandinum. Men áin varð flut, tá Bygdarhúsið og skúlin vórðu bygd, soleiðis at hann nú er nærri Húsalandinum. Tað ger kanska eisini sítt til, at sandurin fer meiria út við landinum, halda staðkendir menn.

Hjálpt er eitt sindur upp á støðuna við at leggja ein garð mitt oman eftir sandinum, soleiðis at hann steðgar eitt sindur á har.

Men kortini fer nakað væl út við landinum og út í havnina, har hann leggur seg.

Ein grynna er innanvert flakavirkið, og hon broytist alla tíðina. Hendan dagin, Sosialurin vitjaði í Miðvági, var fjøra, og Vesturbúgvin, sum hevði landað í Miðvági, var so óheppin at bera við grynnuna, tá hann skuldi avstað aftur.

Hóast skipið var tómt, stakk tað so mikið djúpt kortini, at tað stóð. Teir fingu ein enda á land og háladu so skipið av aftur við spølunum umborð.

Borgarstjórin í Miðvági sigur, at hendan grynnan verður tikin burtur við einum sandbáti. Tað er als eingin trupulleiki at gera tað, tí talan er bara um sand, og fylgt verður so við, hvussu verður, og havnin hildin rein á tann hátt.


Í Býin

Hafnia Lounge
Livandi tónleikur hvørt vikuskifti
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 17.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33
Fax 31 52 50

fk Matseðilin
Hósdagin 11. juli: Hamburgarryggur
Fríggjadagin 12. juli: Kotelettir í fat
Leygardagin 13. juli: Enskur búffur
Mánadagin 15. juli: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 16. juli: Stoktur kalvafiskur
Mikudagin 17. juli: Gullasch
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 23,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

TAXI
Koyr trygt frá og til - ring til BIL
311444 - 313525
Skjót & góð tænasta
SVARAR ALT DØGNIÐ
Bil - Mini Taxi
*Bilstøðin á Farstøðini*





Í Býin

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Sølva & Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
UNDIRHALD
Fríggjadagin 12. juli
• Fimmari
• Opið frá kl. 17.00-20.00
Leygardagin 13. juli
• Opið frá kl. 22.00-04.00
Sunnudagin 14. juli
• Opið frá kl. 17.00-22.00

Casablanca Ristorante
Frá kl: 17:00
Bar-B-Cue
OKSAKJØT
LAMBSKJØT
KALKUN
KYLLINGUR
PYLSIR
EXOTISKAR
SÓSIR
YMISKAR
DRESSINGAR
GRØNMETI
SALATIR
BAKAÐI EPLI
POMMES
FRITTES
RÍS
Veljið sjálvi, og lat Okkara kokk steikja tað.
ET TAÐ TÆR LYSTIR
BERT 98,-
Bileggið borð á tlf 319696

Kaggin
Hóskvøldið spæla
Ókeypis atgongd
Blues Valentin
Fríggja- og leygarkvøldið spæla
Basalt
Fríggjakvøld ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

fríggjakvøldið 12/07
DJ Kristjan Joensen
Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Sent verður beinleiðis í Rás 2
TILBOÐ: sí www.platform.fo
leygarkvøldið 13/07
70'ara kvøld
DJ Kristjan Joensen
Gissur Patursson og aðrir
PLATFORM
discoteque
sí www.platform.fo
petur & petur • 320870

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
Double Up & ókeyðis atgoongd frá kl. 21.00 til 22.00
LIVE kvøld við
All That Rain
Fríggjakvøldið
DJ Martin Kjærbo
ladies night & Double Up til kl. 23.00 -01.00
Leygarkvøldið
DJ Martin Kjærbo
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Í BÝIN
- HVØNN HÓSDAG